# Ein stórur fyrimunur fyri bæði seljarar og keyparar

**Nýggja landingarmiðstøðin á Tvøroyri verður jólatrøll, men í næsta mánað letur hon upp og tá verður hon ein stórur fyrimunur bæði hjá teimum bátum og skipum, sum selja fisk og hjá teimum virkjum, sum keypa fisk**

LANDINGARMIÐSTØÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað hevur ikki gingið heilt sum ætlað at fáa nýggju, framkomnu landingarmiðstøðina á Tvøroyri, lidnað.

Men dagligi leiðarin á landingarmiðstøðini, Marni Olsen, sigur, at ætlanin er at royna maskinurnar í næsta mánað og eftir ársskiftið vænta teir at fara undir virksemið av álvara.

– Tað verður neyðugt at royna maskinurnar frammanundan fyri at stilla tær inn, sum tær skulu.

Í sambandi við landingarmiðstøðina, verður eisini ein kassamiðstøð gjørd og hon fer undir virksemið í næstu viku.

Tilsamans er nýggja landingarmiðstøðin 1.300 fermetrar, harav kassamiðstøðin er 500 fermetrar.



*Marni Olsen er dagligur leiðari á nýggju landingarmistøðini, sum væntandi fer undir virksemið eftir nýggjár. Hann sigur, at tá ið Landingarmiðstøðin letur upp, skuldi tað merkt, at bæði skip og virki fáa ein munandi betri tænastu, enn tey fáa nú. Og tað væntar hann fer at síggjast aftur, bæði í hækkandi prísum og fleiri arbeiðsplásum*

### Nógvir møguleikar

Í nýggju landingarmistøðini, sum stendur beint uttanfyri flakavirkið hjá Fiskavirking á Tvøroyri, verða nógvir møguleikar.

Teir hava keypt eina skiljimaskinu úr Íslandi, sum skilir fisk í átta ymsar støddir.

Tað fer at bera til at stilla maskinuna til at skilja fisk eftir teimum støddum, sum skulu brúkast til at avrokna skipini eftir.

Men hevur eitt skip frammanundan gjørt avtalu við eitt virki um at keypa fiskin, ber tað eisini til at skilja fiskin í tær serligu støddirnar, sum fiskakeyparin vil hava.

– Hóast tær ikki samsvara í stødd, ber sostatt til at gera tvær skiljingar í einum, har tað øðrumegin verður skrásett ein skilјing, sum skipini verða avroknað eftir og tað hinumegin verður skilt í kassar ella kør í tær støddir, sum virki vil hava, sigur Marni Olsen.

Tað merkir, at ein heil arbeiðsgongd verður spard. Tað sparir tíð og ger sítt til at varðveita fiskin so góðan, sum tilber.

Men vil eitt virki hava okkum at skilja fiskin í serligar støddir, gera vit eisini tað fegin.

Hann sigur, at tað ber bæði til at skilja í kør og at skilja í smærri kassar og til at skilja í bæði kassar og kør.

### Betri tænastu

Marni Olsen sigur, at tá ið Landingarmiðstøðin er fingin at virka, skuldi tað ført við sær, at bæði tey, sum keypa fisk og tey, sum keypa fisk, skuldu fingið eina nógv betri tænastu, enn tey fáa í dag.

– Tá ið Landingarmiðstøðin fer at virka, fer tað at bera til hjá bátum og skipum at leggja fiskin upp her, uttan at verða bundnir at nøkrum ávísum virki.

Er ikki avtala gjørd við keyparan frammanundan, verður lastin samstundis boðin til sølu á uppboðssøluni, antin á gólvinum og um telefonina, antin til eitt virki, ella tað verða fleiri keyparar til somu last.

Á Landingarmiðstøðini skilja vit fiskin, soleiðis sum møguligur keypari vil hava hann og syrgja fyri, at virkini fáa fiskin. Ella vit kunnu pakka fisk, sum kanska skal av landinum.

– Hetta skuldi so eisini ført við sær, at tað verður nógv léttari hjá teimum ymsu fiskakeyparunum at fáa akkurat tey sløgini og akkurát tær støddirnar, teir vilja hava.

Marni Olsen heldur eisini, at hetta kann gera sítt til, at meiri arbeiði verður.

– Hetta kann føra við sær, at fleiri smá virki fara at stinga seg upp rundanum Landingarmiðstøðina við tí endamáli at fara undir ymsar serframleiðslur.

Samanumtikið kann hetta skjótt føra við sær, at prísirnir fara upp, tí bæði fer tað at bera til at flokka fiskin meiri nágreiniliga, eins og tað fer at bera til hjá keyparunum at fáa røttu sløgini og røttu støddirnar, samstundis sum væntandi er at fleiri fiskavirki fara at stinga seg upp, so at kappingin harðnar.

Samanumtikið fer tað at vera léttari hjá teimum ymsu virkjunum at fáa fatur júst á teimum fiskasløgum, tey hava brúk fyri. Tað skuldi merkt, at tað skipini skuldu fingið hámarksprís fyri hvørt fiskaslag og hvørja støddm heldur enn sum nú, at summi fiskasløg, sum eru uppí eini last, fara fyri lítið og lætt, tí virki, sum keypir, hevur bara áhuga í einum øðrum fiskaslagi.

### Saknur í

Tað skerst ikki burtur, at tað hevur verið saknur í eini slíkari landingarmiðstøð í Suðuroynni.

Tað gav eisini at bíta, tá ið íleggjarar skulu finnast, tí áhugin var sera stórur.

– Eg haldi, at øll skipini í Suðuroy hava sett pening í Landingarmiðstøðina, umframt nógvir av teimum virknu útróðrarbátunum í norðaru helvt í Suðuroy Men eisini nógv skip norðanfjørðs hava sett pening í ætlanina, umframt Fiskamarknaðurin sjálvur.

Men hóast Fiskamarknaðurin er ein av partaeigararunum, verður dentur lagdur á, at talan er um eitt sjálvstøðugt felag.

Tilsamans er partapeningurin tríggjar milliónir.

Á Landingarmiðstøðini hugsa tey mest um skipini í Suðuroy. Men teir vænta avgjørt eisini, at skip norðaneftir fara at leggja fiskin upp á støðini.

– Tað er væl hugsandi, at skip koma heldur higar at leggja fiskin upp, fyri at spara fleiri tímar í siglingstíð, sigur Marni Olsen.

Á landingarmiðstøðini verða eini fýra-fimm arbeiðspláss, men tað veldst um, hvussu stórt virksemið.



# Hjálpitólarmiðstøðin nógv batnað

**Fyrr tók tað útvið tvey ár at fáa svar upp á umsóknir til Hjálpitólarmiðstøðini. Nú er nógv betur stætt, vísa hagtøl hjá Almannastovuni. Fleiri fólk og broyttar mannagongdir hava hjálpt, sigur Palli Mortensen, leiðari á HTM**

ALMANNAMÁL
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*




*Nú gongur nógv skjótari at fáa hjálp á Hjálpitólarmiðstøðini, vísa hagtøl*
*Mynd: Jens K. Vang*

Hjálpitólarmiðstøðin hevur javnan staðið fyri skotum, tí fólk, sum eru komin illa fyri, hava bíðað í áravís eftir svari uppá, um tey kunnu fáa hjálp. Men nú er vend komin í.

Hjálpitólarmiðstøðin hevur av álvara tikið sær um reiggj, vísa hagtøl, sum Almannastovan hevur handað Fíggjarnevndini hjá løgtinginum í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina.

Samanumtikið vísa tølini, at avgreiðslutíðin stytt-ist munandi, sigur ein errin Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni. Og tølini tala fyri seg.

Taka vit eitt nú umsóknir um bil, so tók eitt mál, sum byrjaði í 2000, heilar 72 vikur at avgreiða í miðal. Tað er hálvt annað ár! Í 2001 vók tað uppaftur longri tíð – heilar 89 vikur. So fór at ganga rætta vegin. Í 2002 tók tað 54 vikur, og higartil í ár hevur tað tikið í miðal 21 vikur hjá fólkum at fáa svar uppá eina umsókn um bil.

Palli Mortensen, leiðari á Hjálpitólarmiðstøðini sigur, at tey eru óalmindiliga glað og errin um tølini.

– Broytingin kemur fyrst og fremst av, at vit hava sett fleiri fólk. Í 2001 arbeiddu 6,5 fólk á Hjálpitólarmiðstøðini. Í dag eru 13 fólk til arbeiðis, og tað ger stóran mun. Harafturat eru vit farin at raðfesta frá 2002, so vit avgreiða málini øðrvísi. Vit hava sett nøkur snar- og bráðmál, og tey vera skjótari avgreidd, sigur Palli Mortensen.

Verður hugt at øðrum økjum, so er talan um somu gongd sum við bilunum. Eitt íbúðarmál, sum byrjaði í 2000, tók í miðal 80 vikur. Tann avgreiðslutíðin er lækkað við 63 vikum, tí nú tekur tað 17 vikur at avgreiða íbúðarmál sambært tølunum hjá Almannastovuni. Sjónmál eru lækkað úr 17 niður í 8 vikur, og vanlig mál eru lækkað úr 25 niður í 13 vikur eftir fýra árum.

Frá 2002 eru mál bólkað í bráð- og snarmál, og tí eru hagtøl ikki tøk fyri hesar málbólkarnar áðrenn. Men annars vísa tølini, at snarmál nú taka 5 vikur at avgreiða og bráðmálini 4 vikur. Í roynd og veru er avgeiðslutíðin á hesum økjum uppaftur skjótari, enn tølini vísa, tí tey vera ikki altíð skrásett beinanvegin.

Tølini skulu yvirhøvur takast við ávísum fyrivarni, sigur almannastjórin fíggjarnevndini, tí í tíðarbilum hevur journalin ikki verið serliga væl virkandi, og tí er gingin long tíð, frá tí at eitt mál í veruleikanum er avgreitt, til tað er endað elektroniskt. Mál verða ikki endað dagliga, og ávirkar hetta eisini tølini skeiva vegin.

## Heimarøktin aftur til skrubburnar

**Reingerðin hjá pensjónistum, sum hevur ligið still síðan 1. juli, tí sparast skuldi, er aftur farin at virka. Nú verður vaskað ein tíma aðru hvørja viku, og tað er helvtina av tí, sum var galdandi áðrenn**

HEIMAHJÁLP
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*

Dustsúgvarin er tikin framaftur, og tað er aftur farið at anga av sápu hjá føroyskum pensjonistum. Fólk í øllum teimum seks heimarøktarøkjunum fáa nú hjálp til reingerð ein hálvan tíma um vikuna, visti Útvarp Føroya at siga í gjár.

Fyri 1. juli fingu pensjonistar ein tima hvørja viku, og sostatt er reingerðin skorin í mun til tá, tí nú verður bara vaskað ein tíma 14. hvønn dag.

Umleið 100 milliónir krónur verða játtaðar til heimarøktina árliga. Næsta ár verður upphæddin á sama støði, sæst í fíggjarlógaruppskotinum, sum er til viðgerðar í løgtinginum. Sostatt er ikki óhugsandi, at sparingar aftur skulu til, tá ið komandi árið er hálvrunnið ella gott tað.

Enn er ov tíðliga at siga nakað sum helst ítøkiligt um, hvussu hesir pengarnir verða býttir, segði Útvarp Føroya, tí tað er ikki alment enn.

# Strangari reglur og eftirlit við útlendingum

**Serligar reglur skulu gerast fyri ítróttarvenjarar og –leikarar, sum koma til Føroya. Samstundis skal eftirlitið við útlendingum í Føroyum herðast, samdust Bertel Harder, integretiónsmálaráðharri í Danmark, og Høgni Hoydal, landsstýrismaður, um hósdagin**

ÚTLENDINGAR
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*



*Høgni Hoydal og Bertal Harder eftir at teir gjørdu avtalu um útlendingapolitikk í Føroyum*

Útlendingarnir streyma inn í landið. Ítróttarfeløg leita sær styrk, og fleiri virki klára seg als ikki uttan útlendska arbeiðsmegi. Umsitingin hevur verið langrøkin, tí málini ferðast aftur og fram millum føroyskar og danskar myndugleikar, og tískil hevur tikið langa tíð, at fáa einfald mál avgreidd. Tað hevur hóska illa – serliga hjá ítróttafeløgum.

Hósdagin var Høgni Hoydal, landsstýrismaður við lógarmálum, á fundi hjá Bertel Harder, integratiónsmálaráðharra, í Keypmannahavn. Teir viðgjørdu reglurnar um arbeiðs- og uppihaldsloyvi til útlendingar í Føroyum í síni heild.

Arbeitt verður við at yvirtaka økið, sum er í bunkanum av yvirtøkum, sum landsstýrið arbeiðir við. Men semja er samstundis um, at tørvur er á at fáa greiðari reglur og mannagongdir beinanvegin.

Reglurnar vera herdar og strangari eftirlit verður við útlendingum, ið søkja arbeiði og uppihald í Føroyum, samdust Høgni Hoydal og Bertel Harder um. Samstundis er semja um at gera greiðari skipanir fyri ávísar bólkar av umsøkjarum.

Ein serliga skipan verður gjørd fyri ítróttarvenjarar og –leikara. Hon byggir á, at krøvini til lønar- og setanartreytir hereftir vera øðrvísi og ásettar í fastari siðvenju. Danskir myndugleikar skulu framvegis hoyra landsstýrið, áðrenn avgerðin verður tikin.

Ítróttafólk skulu kunna søkja arbeiðsloyvi, meðan tey eru í Føroyum, men loyvini skulu verða fingin, áðrenn tey byrja at arbeiða. Sostatt kunnu tey íðka ítrótt uttan arbeiðsloyvi.

Tey ítróttafólk, sum í dag arbeiða í Føroyum, uttan loyvi, fáa eitt stutt skotbrá at søkja, soleiðis at viðurskiftini fáast í rættlag. Sostatt skuldi ikki verið vandi fyri, at nakað ítróttafólk verður sent av landinum, um feløgini bera skjótt at.

Men hetta snýr seg ikki bara um ítróttafólk. Løgmálaráðið lovar at gera uppskot um serliga smidliga mannagongd fyri umsóknir frá serligum fakbólkum, serliga læknum. Bertel Harder lovaði, at ein slík áheitan fór at verða viðgjørd sera skjótt, stendur í tíðindaskrivi frá føroyska løgmálaráðnum.

Annars er semja um, at somu reglur sum higartil skulu galda fyri onnur sløg av arbeiðsloyvum. Munurin er bara, at siðvenjan verður strangari fyri ólógliga arbeiðsmegi.